

*- Sjálvandi fara vit eftir gullinum. Tá tú hevur vunnið fýra ferðir á rað, so vildi tað verið løgið, um vit søgdu nakað annað, sigur Margit Joensen*

*Savnsmynd: Jens Kr. Vang*

# Vónir um trý-settara



*Eingin yvir og eingin við síðuna. Tað tykist vera niðurlagið hjá flogbóltskvinnunum, sum á Rhodos fara eftir fimta gullmerkinum á rað*

*Savnsmynd: Jens Kr. Vang*

**Fýra oyggjaleikafinalur á rað hava føroysku flogbóltskvinnurnar vunnið 3-2 á Saaremaa í finaluni. Gullið er aftur málið, men sjálvar hava kvinnurnar einki ímóti, um hetta kann vinnast yvir trý sett í finaluni**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sterkastu siðvenjuna av øllum, tá tosað verður um føroyska oyggjaleikaluttøku, munnu flogbóltskvinnurnar hava. Síðani leikirnir byrjaðu í 1985 hevur flogbóltur verið partur av føroysku umboðanini, og hjá kvinnunum hevur úrtøkan seinastu fýra ferðirnar verið gull eftir finalusigur á Saaremaa. Allar fýra ferðirnar við einum settmuni á 3-2.

Tí er gullið sjálvsagt mál aftur hesaferð, tá Margit Joensen og hinar á føroyska landsliðnum fara á vøllin.

– Sjálvandi fara vit eftir gullinum. Tá tú hevur vunnið fýra ferðir á rað, so vildi tað verið løgið, um vit søgdu nakað annað, sigur Margit, sum við fimm oyggjaleikaluttøkum telist millum tær meira garvaðu spælararnar á liðnum. Fýra av hesum hevur hon altso vunnið gull, meðan luttøka hennara í 1995 kastaði silvurmerki av sær.

– Men vit vita ikki so nógv um hini liðini. Væntandi er tað Saaremaa, sum verður argasti kappingarneytin hjá okkum, men eg rokni eisini við, at Áland fer at blanda seg. Stóri spurningurin er, hvussu teirra ungu spælarar eru. Vit hava eisini nakrar, sum eru nýggjar á liðnum, men vit eru ikki viknaðar fyri tað.

Og verður finalan aftur fimm sett í ár?

– Nú mugu vit fyrst koma til finaluna. Men eg hevði nú einki havt ímóti, um vit kundu avgjørt í trimum settum, um vit koma somikið langt. Tað kann væl vera, at tað er munandi meira spennandi hjá áskoðarunum, tá talan er um fimm sett. Men tá verður trýstið á spælarunum sera stórt, og so er skjótt, at onkur býtt mistøk kunnu stinga seg upp.

## Hugurin rekur

Mest sum einaráðandi støðan hjá føroysku kvinnunum í oyggjaleikahøpi kann kanska fáa fólk at halda, at stuttleikin hjá spælarunum ikki áhaldandi kann vera tann sami. Ikki minst, tí talan í nógvum dystum er um avgreiðsluspurningar. Men hesum er Margit tó als ikki samd í.

– Tað er nakað heilt serligt við leikunum. Bæði tí hetta er ein kapping, har vit fáa nakrar góðar dystir, men eisini tí sosiali parturin fyllir so nógv. Hjá okkum sært tú eisini, at vit eru fleiri, sum hava verið við liðnum í nógv ár. Men eg haldi, at vit allar hava sama viljan, tá vit fara út á vøllin. Fyri mítt viðkomandi sigi eg altíð, at mín partur ikki skal liggja eftir. Og tá hinar eisini gera tað sama, so verður stuttleikin av sær sjálvum munandi størri. Og tá er tað munandi lættari at koyra á til bæði venjing og dystir, sigur Margit.


Annika


Birgit


Elspa Sofía


Guðrið


Helga


Karin


Katrin


Margit


Ruth


Sóley


Sólgerð


Sólvá